RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

betri

GONGUROYNDIN

STIG FYRI STIG – VEGLEIÐING TIL LÆRARAN

Yvirlit yvir gongdina

Gonguroyndin er býtt í trý:
Kunningarbræv til foreldrini, ástøðiligt tilfar og verkligur partur.
Tá ið gonguroyndin er liðug, fáa næmingarnir skreytblað.

1 Foreldrini

Tak foreldrini við: Saman við tilfarinum er eitt kunningarbræv til foreldrini klárt at prenta út ella at senda sum leinki. Kunningarbrævið greiðir foreldrunum frá, at tit fara undir at arbeiða við ferðslu, og at børnini fáa uppgávur heim við sær um evnið, sum tey skulu loysa saman við foreldrunum.

2 Ástøði, 2-3 skúlatímar

Nýt tilfarið "Alvi og Ria fara gongutúr", sum er ein talgild søga, bygd á ástøði um atferð í ferðsluni. Tilfarið leggur upp til at tosað verður um søgugongdina í flokkinum. Til ber eisini at taka verkliga og ástøðiliga partin í øvutari raðfylgju, men tað er skilabest at hava ástøðið við næmingunum fyrst.

3 Verkligur partur, 2-3 skúlatímar

Næmingarnir fara út at venja seg at ganga í ferðsluni saman við einum ella tveimum lærarum alt eftir, hvussu nógvir næmingar eru.

Flokslærarin kann biðja SSP-læraran á skúlanum gera avtalu við SSP-løgregluumboðið um ferðsluundirvísing í 1. flokki. Hetta má verða gjørt í góðari tíð. Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til, at skúlin tekur av hesum tilboðnum eisini.

Hugskot

Nýt tilfarið "Tann stóri býurin", sum er ein meldurmynd úr einum býi, umframt prentuppgávur til næmingarnar. Meldurmyndin kann elva til góðar samrøður og kjak í flokkinum um ymiskt, ið berst á í ferðsluni.

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÁDET FOR SIKKER TRAFIK

1 Tak foreldrini við

Við hús

Gev foreldrunum kunningarbrævið, so tey kunnu fylgja við í tí, sum fer fram. Brævið kunnar foreldrini um, at flokkurin fer at arbeiða við Gonguroyndini. Dentur verður lagdur á týdningin av, at foreldrini taka undir við átakinum og brynja barnið til uppgávuna. Sum liður í fyrireikingunum til Gonguroyndina verða foreldrini biðin um at loysa eina ávísa uppgávu saman við barninum.

Uppgávan er í tveimum pørtum:

- **"Gakk ein túr við barninum"**
- **"Finn eina trygga skúlaleið"**

Í brævinum til foreldrini eru nakrar venjingar, sum foreldur og barn kunnu venja, tá tey eru gongutúr. Málið er millum annað, at barnið lærir seg at fara tvørtur um ein veg á rættan hátt. Børn og foreldur fáa góð ráð um, hvussu skúlaleiðin gerst tryggari. Skjótasta leiðin er ikki altíð tryggasta leiðin, tað vita vit.

Tryggasta leiðin er ein við góðum sýni, og har ikki er neyðugt at fara tvørtur um vegin um til ber. Børn og foreldur kunnu saman tekna eitt kort yvir skúlaleiðina. Á heimasíðuni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, **www.ferdslutrygd.fo**, fáast góð ráð undir 'Venjingar'.

Samanumtøka í flokkinum

Hóskandi er at seta tíð av til felags samanumtøku, har næmingarnir greiða frá sínum tryggu skúlaleiðum. Kanska ganga fleiri næmingar somu leið og kunnu leggja afturat hvør hjá øðrum.

Tosið um "trygga skúlaleið"

- Hvat hevur tú tosað við foreldrini um?
- Hvat heldur tú vera tað lættasta/torførasta á skúlaleiðini?
- Hvat ger skúlaleiðina trygga?

2 Ástøði : Alvi og Ria fara gongutúr

Áðrenn tú byrjar

Tilfarið er í fimm pørtum og er lætt at arbeiða við. Tað er tó ein fyrimunur, hevur tú hugt at øllum tilfarinum og roynt allar funkurnar, áðrenn undirvísingin byrjar.

Um tilfarið

"Alvi og Ria fara gongutúr" er sniðgivið til at stimbra samrøðugrundaðari talvuundirvísing. Lærarin stýrir tilfarinum á samvirknu talvuni og fer gjøgnum tilfarið í samrøðu við næmingarnar.

Partarnir skulu nýtast í ávístu røð. Í hvørjum parti eru nakrar myndir, har Alvi, Ria og hundur teirra leiða næmingarnar á einum gongutúri ígjøgnum býin.

Tøkni

Tað, sum krevst, er annaðhvørt ein telda við vørpu ella ein samvirkin talva við internetkaga.

Tilfarið virkar best, verður tað víst á heilum skíggja. Vel "heilan skíggja", tá ið tú setur kagan upp. Í Internet Explorer 8, Chrome og Firefox trýstir tú á "F11" ovast á knappaborðinum.

2



Spurningur:

Á hvørjari mynd verður settur ein opin spurningur, sum skal fáa samrøðu í lag í flokkinum. Næmingarnir skulu ofta taka støðu til, hvør ber seg rætt at í ymsum støðum í ferðsluni. Eisini er ymiskt annað at tosa um.

Gular stjørnur:

Gular stjørnur eru settar á tær myndirnar, har ivi kann vera um rætta svarið. Trýstir tú á eina stjørnu, fáa tit eina mynd við rætta svarinum. Vit mæla til, at tú nýtir hesa funkuna.

Ímyndir undir myndini:

Nakrar av myndunum kunnu vísa fleiri ymisk frábrigdi av somu støðu. Til dømis eitt ferðsluljós, sum er reytt, síðan grønt og aftur reytt. Tú kanst skifta millum ymsu støðurnar við at trýsta á teknini undir myndini. Tá ið tú hevur trýst á eina støðu, kemur eitt grønt flugubein á teknið soleiðis, at tú sært, at tit hava avgreitt hesa støðuna.

Pílar:

Tá ið tit hava verið gjøgnum øll frábrigdi av eini støðu, kunnu tit halda fram við gongutúrinum saman við Alva og Riu. Tað gert tú við at trýsta á pílarnar. Legg til merkis, at tú ikki kanst halda fram, fyrr enn tit hava verið ígjøgnum øll frábrigdini av hesi støðuni.

Høvuðsvalmynd:

Á øllum myndunum ber til at venda aftur til høvuðsvalmyndina við at trýsta á húsið ovast høgrumegin.

Partarnir

1. partur: Eru tit klár til gongutúr?

Í 1. parti er bert ein mynd, har Alvi og Ria fyrireika seg til ein gongutúr. Umráðandi er at tosa um at vera sjónlig í ferðsluni. Hvønn týdning hava endurskin og litrík klæði fyri trygdina?

2. partur: Hvør eigur at vera hvar?

Í 2. parti læra vit, hvar vit eiga at ganga, og hvør eigur at vera hvar.

Meginreglan er, at á einum vegi við ongari gongubreyt eiga vit at ganga í vinstru síðu. Ein góður máti at minnast hetta er, at vit altíð skulu ganga tí megin, har vit síggja framljósini á mótkoyrandi ferðsluni. Hóast hetta kunnu vit ganga í grasinum, men vandin er, at tað kann vera bratt ella smalt.

Tit umrøða eisini hvørji onnur, næmingarnir kunnu síggja í ferðsluni, og hvat teir skulu vera varugir við. Týdningarmikið er at tosa um munin millum bleyta og harða ferðslu umframt um ferðina – tað er hvør koyrir skjótt, og hvør koyrir spakuliga.

Legg stóra áherðslu á, at næmingarnir altíð mugu ansa sær í ferðsluni, eisini hóast teir ganga á gongubreytini. Tað er ikki víst, at fólk til gongu altíð hava gongubreytina fyri seg sjálv. Kjakist millum annað um, hvussu til ber at síggja, um ein bilur er í ferð við at bakka . Til dømis, um tað hoyrist, at bilurin er tendraður, roykur sæst úr útstoytinum, ljósini eru tendrað.

3. partur: Hvussu fara tit tvørtur um vegin?

3. partur snýr seg um, hvussu farast skal tvørtur um vegin. Næmingarnir skulu læra, hvat teir eiga at gera, tá teir fara tvørtur um vegin: Hvar er tryggast at fara tvørturum, og hvat skulu teir gera fyri at fáa besta sýnið?

Fyrst og fremst skulu næmingarnir læra, at teir altíð skulu steðga og hyggja væl til báðar síður, soleiðis at teir vita, at vegurin er fríur, áðrenn teir fara tvørturum. Ein kantsteinur merkir STEÐGA.

Síðan skulu næmingarnir læra, at teir skulu nýta gonguteigin, um ein slíkur er. Tó er týdningarmikið at vísa á, at næmingarnir framvegis skulu steðga og hyggja væl til báðar síður, áðrenn teir fara tvørturum. Eisini er umráðandi at vísa á, at kemur ein bilur og tú vil vissa teg um, at bilurin hevur sæð teg, fá eygnasamband við bilføraran. Vit skulu ongantíð vænta, at bilarnir av sær sjálvum steðga fyri okkum.

Tað er eitt gott hugskot at hyggja at viðurskiftunum í nærumhvørvinum hjá skúlanum.





4. partur: Hvussu fara tit tvørtur um krossvegin?

4. partur snýr seg um, hvussu tú skalt bera teg at við krossvegin. Vístir verða krossvegir bæði við og við ongum ferðsluljósi, og aftur í hesum føri er hóskandi at seta hetta í samband við viðurskiftini í nærumhvørvinum .

Her er týdningarmikið, at næmingarnir læra, at teir skulu kunna seg allar vegir, áðrenn teir fara tvørtur um krossvegin. Næmingarnir skulu tí ansa eftir ferðslu báðumegin frá, men eisini um nakar kemur framman- ella aftanífrá, sum skal snara.

Tá ið tit tosa um ferðsluljós, er ein týðandi boðskapur, at næmingarnir læra, at teir framvegis skulu kunna seg allar vegir, og at teir altíð skulu tryggja sær, at bilar og onnur akfør steðga, áðrenn teir fara tvørturum, eisini hóast ljósið er grønt.

5. partur: At síggja og verða sædd/ur

5. partur leggur dent á at hyggja fram fyri seg og at verða sædd/ur. Næmingarnir skulu vita, at onkuntíð kann vera torført hjá bilførarum at bera eyga við børn og onnur í ferðsluni. Orsøkin kann vera, at tey eru stødd í einum blindum vinkli, ella tí tey eru torfør at síggja til dømis, tí tað er myrkt.

Ein týðandi boðskapur til næmingarnar er, at teir skulu altíð royna at hava eygnasamband við onnur í ferðsluni fyri at tryggja sær, at teir verða sæddir.



3 Verkliga gonguroyndin

Sum áður sagt, mælir Ráðið fyri Ferðslutrygd til, at flokslærarin vendir sær til SSP-læraran fyri at fáa í lag avtalu við SSP-løgregluumboðið um at undirvísa í ferðslu í 1. flokki.

Tilfarið í sambandi við "Alvi og Ria fara gongutúr" kann annaðhvørt verða nýtt fyri ella eftir vitjanina hjá løgregluni.

Úti í ferðsluni

Nú skulu tit út at royna alt tað, tit hava tosað um í flokkinum. Tit kunnu byrja við nøkrum venjingum og enda við at ganga eina leið, sum er løgd frammanundan, alt eftir hvussu nógva tíð tit hava sett av.

Mælt verður til, at næmingarnir eru í endurskinsvestum, tá ið tit fara út í ferðsluna.

Lat næmingarnar leiðast tveir og tveir í einum raði. Hevur tú møguleika fyri størri avbjóðing, kanst tú í ávísum førum lata næmingarnar royna seg ein og ein.

Er talan um stóran flokk mugu í minsta lagi tvey vaksin vera við í royndini – ein frammanfyri og ein aftanfyri.

At ganga í bólki

Áðrenn tit fara út, er týdningarmikið at tosa um, hvussu tit eiga at ganga, um tit eru nógv saman. Ganga børnini tvey og tvey, fylla tey minst og eru best savnað. Greið næmingunum frá, at teir altíð skulu ansa sær í ferðsluni og ikki bara fylgja við bólkinum uttan sjálv at hyggja fram fyri seg.

Tað er umráðandi, at børnini læra at ganga tætt aftan fyri tey, sum ganga frammanfyri í raðnum, tá ið tey skulu tvørtur um vegin saman. Koma glopp í raðið, kann vandi standast av, um eitt akfar roynir at koma sær ímillum gloppini.

Legg eina leið til rættis

Finn eina leið í nánd av skúlanum, har næmingarnir sleppa at royna sum mest av tí, tey hava lært í ástøðiligu undirvísingini. Yvirlitið á næstu síðu kann verða nýtt sum ein minnislisti til, hvat kann vera á leiðini, og hvørjar reglur eru galdandi.

Eini góð ráð

Gakk frammanfyri, greið frá og vís næmingunum, hvat teir skulu gera.

Vís teimum til dømis, hvussu tey skulu fara tvørtur um vegin. Lat síðani tey bæði fyrstu børnini loysa uppgávuna, og soleiðis verður hildið fram, til øll hava roynt seg. Lat ein annan vaksnan vegleiða tey børnini, sum standa fyri tørni.

Endurskinsvestar – so næmingarnir síggjast

Lat næmingarnar vera í endurskinsvestum, tá ið tit fara út í ferðsluna.

3

Evni	Støða	Hvat siga reglurnar?
Hvar skal eg ganga?	**Vegur við gongubreyt**	Meginreglan er, at tú eigur at ganga á gongubreytini.
	Vegur við ongari gongubreyt	Tú eigur at ganga vinstrumegin á vegnum. Gakk á teirri síðuni, har tú sært framlyktirnar á bilunum, sum koma móti tær.
Hvussu fari eg tvørtur um ein veg?	**Steðga við kantsteinin**	Ein kantsteinur merkir, at tú skalt steðga. Tú skalt altíð steðga, áðrenn tú fert tvørtur um vegin.
	At kunna seg	Hygg altíð væl til báðar síður. Far tvørtur um vegin, tá eingin bilur sæst.
	At fara tvørturum	Gakk kvikliga beint tvørtur um vegin og hygg samstundis til báðar síður. Tú mást ongantíð renna ella fara á skák tvørtur um vegin. Rennur tú, er vandin at detta størri.
	Ringt sýni, til dømis í einum vegbugi	Far ikki tvørtur um vegin, har sýnið er ringt.
	Parkeraðir bilar	Best er at fara tvørtur um vegin, har eingir parkeraðir bilar standa. Um tú tó skalt tvørtur um ein veg við parkeraðum bilum, skalt tú fara varisliga fram millum bilarnar. Steðga ytst árakað bilin, soleiðis at tú sært, um nakar bilur er á vegnum, og bilførararnir samstundis síggja teg.
	Gonguteigur	Nýt altíð gonguteigin, um ein slíkur er á vegnum. Steðga við kantsteinin og hygg til báðar síður, áðrenn tú fert tvørtur um vegin. Onkuntíð steðga bilarnir, men tú kanst ikki vera vís/ur í tí. Fá eygnasamband við bilføraran.
	Ferðsluljós	Tú eigur at fylgja ljósteknunum. Er ljósið longu grønt, tá ið tú kemur til kantsteinin, kann vera gott at bíða til næstu ferð, ljósið lýsir grønt. Skiftir ljósið til reytt, meðan tú ert á veg tvørtur um vegin, skalt tú at halda fram. Gakk kvikliga, men renn ikki. Hóast ferðsluljósið stýrir ferðsluni, eigur tú eisini at hyggja til allar síður at tryggja tær, at eingin ferðsla er. Ver serliga varug/ur við ferðslu, sum sneiðir inn fyri teg framman- ella aftanífrá.
	Eygnasamband	Royn og fá eygnasamband við onnur, tá tú ert úti í ferðsluni. Royn til dømis at fáa eygnasamband við bilførara, áðrenn tú fert tvørtur um ein veg fyri at tryggja tær, at hann hevur sæð teg.
Hvussu beri eg meg at, um eg skal tvørtur um ein krossveg?	**Krossvegur**	Hygg væl rundan um teg. Tað merkir, at tú bæði skalt hyggja, um nakar kemur frá síðunum, men eisini um onkur kemur framman- ella aftanífrá, sum ætla at snara inn á tann vegin, sum tú skalt tvørturum.
	T-krossvegur	Hygg væl rundan um teg, áðrenn tú fert tvørturum.
Hvussu beri eg meg at fram við vegnum?		Tú skalt savna tankarnar um ferðsluna og ikki lata teg órógva av spæli, fartelefon ella øðrum.
		Hoyrir tú eina sirenu frá einum sjúkra-, brand- ella løgreglubili, skalt tú steðga og halda teg á gongubreytini
Hvussu beri eg meg at í ferðsluni í myrkri?	**Sýni**	Minst altíð til at nýta endurskin, tá tú gongur úti í myrkri. Best er at hava fleiri endurskin, til dømis á beinum, tasku og jakka. Minst til, at ljós klæði síggjast best í myrkri. Skilagott er altíð at nýta endurskinsvest, tá tú ert til gongu í ferðsluni - eisini um dagin.

Hugskot

Venjið í ferðsluni og vitjið næmingarnar. Havið myndatól við og takið myndir av næmingunum framman fyri bústaðin. Tit kunnu eisini avmynda støður í ferðsluni, sum tit kunnu kjakast um, tá tit koma aftur í skúla.

4 Skreytblað

Gev næmingunum skeytblað, tá ið teir hava staðið gonguroyndina.

Allir næmingar standa Gonguroyndina. Er onkur næmingur, sum stendur seg illa, er umráðandi, at bæði næmingar og foreldur fáa boð um tað.

Minn bæði næmingar og foreldur á, at tey skulu halda fram við ferðsluvenjingini. Legg dent á, at hóast næmingarnir hava lært nógv um, hvussu tey skulu bera seg at í ferðsluni, so merkir tað ikki, at tey eru búgvin at vera einsamøll í ferðsluni. Foreldur duga best at meta, nær børnini klára seg einsamøll í ferðsluni.

Málið er, at barnið megnar at:

- skilja reglurnar fyri at fara tvørtur um ein veg
- vera tolið og klára at bíða við at fara tvørturum, til umstøðurnar eru tryggar
- gáa um týðandi viðurskifti í ferðsluni
- duga at síggja og meta um munin á ferðini hjá ymsum akførum og meta um fjarstøðuna til tey
- duga at meta um, hvat onnur í ferðsluni fara at gera
- duga at meta um, nær eitt glopp er í ferðsluni, soleiðis at trygt er at fara tvørturum
- megna at taka støðu so skjótt, at til ber at koma tvørtur um vegin, áðrenn ov seint er

Góð ráð til fólk til gongu

- Nýtið gongubreytina, um ein slík er...
- ...er eingin gongubreyt, gangið vinstrumegin á vegnum
- Havið endurskin, tá ið myrkt er ella skýmir
- Gangið ikki aftan fyri akfør, sum bakka
- Farið ikki tvørtur um vegin, fyrr enn bussurin er farin